## VIÐMERKINGAR

# Enn einaferð kennir útjaðarin mesta sviðan av arbeiðssteðgi

ALMENN ÁHEITAN:

**Steinbjørn O. Jacobsen**
*borgarstjóri*



Í gjár, hósdagin tann 13. oktober 2005, fréttust boð úr høvuðsstaði okkara, at enn ein arbeiðssteðgur, hesa ferð á almenna arbeiðsmarknaðinum, er veruleiki.

Hesa ferð er ORSØKIN sambært fjølmiðlunum samanumtikið ein ósemja upp á eittans prosent - tað er tað, ið skilur partarnar, nú teir skiljast, og sum ger, at føroyska samfelagið enn einaferð skal setast í tómgongd, í øllum førum lutvíst, og serstakliga útjaðarin verður raktur.

Vit, sum ikki eru beinleiðis partur av samráðingunum hava ikki tað neyðuga innlitið og eiga heldur ikki at geva nøkrum ávísum parti skuldina fyri hendan arbeiðssteðgin, men eg loyvi mær at ivast í, um partarnir eru greiðir yvir, hvussu stóran ampa ein arbeiðssteðgur er fyri útjaðaran í Føroyum, tí vóru partarnir tað, høvdu teir neyvan lagt landið lamið á henda hátt fyri eitt prosent í lønarósemju.

Tá ið munurin er so lítil, sum hann er hesaferð, verða avleiðingarnar av einum arbeiðssteðgi ógvuliga seint, um nakrantíð, innafturvunnir.

Givið er, at lønarsamráðingarnar hava snúð seg um meira enn hetta eina prosentið, men tað er óskiljandi fyri okkum uttanfyristandandi, at samráðingarpartarnir skiljast og lata ein arbeiðssteðg lemja landið, tá teir nú vóru komnir so nær hvørjum øðrum.

Her nyttar ikki at lasta hvørjum øðrum - nei, allir partar av samráðingunum mugu nú vísa ábyrgd.

Sjálvandi ger alt mun, men eftir øllum at døma vóru partarnir komnir so nær hvørjum øðrum, at tað er ilt at fáa eyga á nakra skilagóða grund til at leggja eitt samfelag lutvíst lamið fyri eina í krónum og oyrum so avmarkaða ósemju.

Sum nevnt skal eg, sum uttanfyristandandi, ikki leggja nøkrum ávísum parti hesa fyri samfelagið og serstakliga fyri útjaðaran sera óhepnu og skaðiligu støðu til last, tí tað skulu jú sum kunnugt fleiri partar til at vera ósamdir.

Hinvegin vil eg siga, at hvørgin parturin kann snúgva sær undan at taka ábyrgd, og undirritaði vil tí sum borgarstjóri í størstu kommununi uttan fyri høvuðsstaðin heita inniliga á partarnar í hesi arbeiðsmarknaðarósemju um saman at gera tað neyðuga, so vit sleppa undan hesi rættiliga meiningsleysu støðu, at týðandi partar av samfelagnum verða lagdir lamnir fyri eina so avmarkaða ósemju.

Sama um tað er verkfall ella verkbann, so er AVLEIÐINGIN av teimum alt ov nógvu arbeiðssteðgunum, sum eru her á landi, at samfelagið missur stabilitetin, sum eitt nú høvuðsvinna okkara als ikki kann vera fyriuttan.

Góðu samráðingarfólk! Gerið Føroya fólki tann beina, at tit ikki leiða samfelag okkara út í enn eina skaðiliga tómgongd, ið kann elva til, at stór samfelagsvirði fara fyri skeyti, men gerið - báðir partar - tað neyðuga til, at ein loysn verður funnin. Longur tit drála, størri verður skaðin.

# Starvsmannafelagið: Ja, til reallønarlækking í eitt ár Landsstýrismaðurin: Nei

**Starvsmannafelagið góðtók semingsuppskot um reallønarlækking í eitt ár, fyri at fáa"skipaði viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum". Landsstýrismaðurin vrakaði uppskotið**

**Starvsmannafelagið**
*Tórshavn 14. oktober 2005*

Áðrenn tingingarnar millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið byrjaðu, var landsstýris-maðurin í sjónvarpinum og segði, at tað kom ikki upp á tal at hækka lønirnar. Við hesum úttalilsi blokeraði hann sína egnu samráðingarnevnd.

Tá samráðingarnar so sjálvandi einki góvu, góðtók Fíggjarmálaráðið at fara undir seming. Tá semingsuppskotið kom, vísti landsstýrismaðurin tí aftur og segði aftur 0,00 kr.

Tá so partarnir sjálvandi fara hvør til sín, er landsstýrismaðurin frammi og sigur, at fólk framvegis hava skyldu til at arbeiða! Hvussu leingi? Kanska til semingsmenninir siga 0,00 kr.?

Í setanarskjalinum hjá limum Starvsmannafelagsins stendur, at løn og onnur viðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvs-mannafelagið. Tað merkir, at er eingin sáttmáli millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, er eingin avtala um løn ella onnur viðurskifti. Hetta er sera einfalt og elligamalt í føroyskum arbeiðsrætti.

Hvørja løn og hvørji viðurskifti heldur landsstýrismaðurin skulu galda nú? Tað verður einki sagt um. Vit hava jú onga avtalu. Gangast má út frá, at hann meinar, at tað skal vera fyri ta løn og tær treytir, sum hóska Fíggjarmálaráðnum!

Men eingin kann tvinga ein annan til at arbeiða fyri seg fyri løn ella til treytir, sum viðkomandi ikki vil góðtaka. Tíðirnar eru farnar frá slíkum fyri fleiri hundrað árum síðani.

Eftir teimum reglum, sum partarnir hava avtalað um seming, hevur Fíggjarmálaráðið við at vraka semingsuppskotið nettupp boðað sínum starvsfólki frá, at ráðið ikki ynskir tey til arbeiðis til tær treytir, sum semingsuppskotið ásetir.

Tað harmar Starvsmannafelagið, at Fíggjarmálaráðið hevur læst seg so fast, men tað ber ikki til hjá felagnum at senda fólk aftur til arbeiðis, tá ongar reglur eru um løn ella onnur viðurskifti.

Ynskir Fíggjarmálastýrið partar av tí almenna virkseminum í gongd aftur, má hann venda sær til felagið, so greiða kann fáast á, um avtala ella fyribilsavtala kann gerast millum partarnar á teimum økjum, sum talan kann vera um.

Bárður Nielsen:

# Eitt ár er ov stutt

**Hóast landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur vrakað semingsuppskotið frá semingsmonnunum, merkir tað ikki, at verkbann er galdandi**



Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, hevur vrakað semingsuppskotið, sum semingsstovnurin hevur lagt fyri Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Orsøkirnar eru tað stutta tíðarskeiðið og lønarhækkanin.

Ein eitt ára sáttmáli er ov stuttur og gevur hvørki stabilitet ella frið á arbeiðsmarknaðinum.

- Vit hava heldur arbeitt fram ímóti at fáa sáttmálaskeiðini longri, tí so er friður á arbeiðsmarknaðin í longri tíð, og tað merkir samstundis stabilitet. At fara hinvegin og stytta sáttmálatíðarskeiðið er skeiv leið at halda", sigur Bárður Nielsen.

- Skuldi lønarhækkanin í semingsuppskotinum verði galdandi fyri allan almenna sektorin, hevði tað kostað landskassanum ov nógv, tá ið hugsað verður um samfelagsbúskapin og hallið í landshúsarhaldinum komandi ár. Alternativið til lønarhækkan er at avmarka talið á almennum størvum, og tað er neyvan ynskiligt, sum búskaparligu vánirnar eru, sigur Bárður Nielsen.

Hann sigur víðari, at Fíggjarmálaráðið var og er framvegis sinnað at samráðast víðari, so at ein semja kann verða funnin", sigur Bárður Nielsen.

Hóast landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur vrakað semingsuppskotið, merkir tað ikki, at verkbann er galdandi.

- Ein meginregla í setanarrættinum er, at hóast kollektivir sáttmálar fara úr gildi, eru individuellu sáttmálarnir framvegis galdandi, sigur landsstýrismaðurin.

Í hesi støðu merkir tað - hóast semingsuppskotið er vrakað - at limirnir í Starvsmannafelagnum hava skyldu at røkja sítt arbeiði. Hetta líka til annaðhvørt Starvsmannafelagið boðar frá verkfalli ella Fíggjarmálaráðið boðar frá verkbanni.

- Fíggjarmálaráðið hevur ikki boðað frá verkbanni, sigur Bárður Nielsen.

# Tómar tunnur buldra mest

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Í tí politiska lívinum sýnist tað at verða soleiðis, at tey ið tosa mest um eitt mál, fáa tað ongantíð, og er Tjóðveldisflokkurin eitt gott dømið um tað.

Tað hevur verði nógv sagt og rópt frá Tjóðveldisflokkinum, í meira enn eina hálva øld, uttan at nakað er komi burtur úr, á sjálvbjargningarleið. Orsøkin sigst verða, at øll hini hava skylduna, serstakliga danir og so allir føroyingar ið velja aðrar politiskar flokkar.

At Tjóðveldisflokkurin ikki vil síggja veruleikan í eyguni, má heimastýrislógin verða besta dømi um. Flokkurin vil ikki góðtaka lógina, men teir sova og liva við henni, av henni, eftir henni og teir hava brúkt hana við húð og hár, í skjótt 60 ár.

Øll hendan gartering, hevur víst seg at vera *buldur í tómum tunnum*, í royndini at fjala út yvir undirlutakenslur og ómegd í meira enn eina hálva øld, hjá Tjóðveldisflokkinum.

Eitt orðatak ið passar væl til henda politiska flokk er: *at einki er ómøguligt hjá tí, sum ikki noyðist at gera tað sjálvur*